VIÐMERKINGAR

# Frameftir í felag

**John Johannessen**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Trýrt tú uppá einari ríkar Føroyar? Trýrt tú uppá, at vit standa okkum í kappingini við umheimin og harvið fáa ein sterkan búskap. Eitt sterkt vinnulív, sum er grundarlagið undir góðum sosialum skipanum, góðari skúlaskipan og sterkum mentanarlívi?

Javnaðarflokkurin trýr uppá tað. Eg trúgvi uppá, at hetta ber til.

Men skal hetta vera málið, mugu vit brúka politisku orkuna til at brynja samfelagið til alheimsgerðina. So mugu vit burtur frá konservativa stríðnum um fullveldi ella samband, ja ella nei, svart ella hvítt. Eitt stríð, sum onki úrslit gevur.

Javnaðarflokkurin er lykilin til tjóðskaparligu semjuna. Vit hava skapt semjuna í samgonguni.

Nú skulu vit skapa úrslitini.

Við Javnaðarflokkinum á Fólkatingi fáa vit semju um yvirtøkulógina, veruligar heimildir í uttanríkispolitikki og sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum. Úrslitið av hesum verður størri orka til veruligu avbjóðingarnar. At styrkja samfelagið í altjóða kappingini.

Samstundis er eitt javnaðarumboð á Fólkatingi eitt gott amboð til at lata dyr upp til útheimin. Hetta er avgerðandi fyri framtíðar framburð.

Góði veljari — lat okkum í felag hygga frameftir.

Latið okkum nýta politiska orkuna til at menna eitt positivt og fruktagott samstarv við Danmark og við allan heimin, samstundis sum vit menna okkara politiska og búskaparliga sjálvstýri.

Eitt samstarv millum javnlíkar samstarvspartar.

Leiðin fram í øllum altjóða høpi er samstarv.

Samstarv gevur úrslit á snøgt sagt øllum økjum.

Heimurin stendur okkara vinnulívið opin um vinnulívið klárar at takla altjóðagerðina.

Tað er tí altumráðandi fyri menning og framburð í Føroyum, at vit troyta møguleikarnar, ið altjóðagerðin bjóðar og at vit megna hetta.

Vit skulu tí vera við á altjóða pallinum — vit skulu taka lut í altjóðagerðini viðurkenna altjóðagerðina sum eina røða av møguleikum og avbjóðingum — ikki sum eina røð av hóttanum móti okkara mentan og samleika. Føroysk mentan og samleiki eru sterkari enn so, at tey verða týnd av altjóðagerð. Men hetta krevur, at vit støðugt menna og brynja okkum til altjóðagerðina við betri og betri útbúgvingarskipanum og við at byggja mentanarligar og politiskar brýr til umheimin.

Menna samstarv við Danmark, við ES sum heild og við aðrar tjóðir t.d. USA, Ísland og Noreg um útbúgving og gransking.

Fólkatingsessurin er eitt av mongum avboðum í hesi tilgongd. (Nýta fólkatingssessin sum eitt strategiskt ambið í hesi tilgongd fram móti nógv størri altjóða samstarvi)

Fólkatingið er ein av mongum stovnum, ið gevur góðar møguleikar at styrkja okkara støðu í altjóðagerðini.

Vit vilja tí nýta fólkatingsessin sessin sum lopfjøl út í heim. Hann kann vera við til at lata dyr upp úteftir á europeiska meginlandið og víðari ut í heimin.

Hava ein strategi fyri okkara altjóða samstarvi.

# Føroyar í heiminum

**John Johannessen**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Ein tann størsta avbjóðingin í dag er altjóðagerðin. Heimurin stendur okkara ungdómi opin við veldugum møguleikum.

Okkara ungdómur hevur alheimin sum arbeiðsmarknað og møguleikarnir eru at kalla markleysir, um forteytirnar eru í lagi. Týdningarmesta fortreytin er útbúgving og førleikar.

Týdningarmesta tilfeingi í framtíðini verður vitan og førleikar - evni at laga seg eftir skiftandi umstøðum í einum heimi í áhaldandi og skjótari broytoing.

Heimurin stendur okkara vinnulívið opin um vinnulívið klárar at takla altjóðagerðina.

Tað er tí altumráðandi fyri menning og framburð í Føroyum, at vit troyta møguleikarnar, ið altjóðagerðin bjóðar og at vit megna hetta.

Vit skulu tí vera við á altjóða pallinum - vit skulu taka lut í altjóðagerðini viðurkenna altjóðagerðina sum eina røða av møguleikum og avbjóðingum - ikki sum eina røð av hóttanum móti okkara mentan og samleika. Føroysk mentan og samleiki eru sterkari enn so, at tey verða týnd av altjóðagerð. Men hetta krevur, at vit støðugt menna og brynja okkum til altjóðagerðina við betri og betri útbúgvingarskipanum og við at byggja mentanarligar og politiskar brýr til umheimin.

Menna samstarv við Danmark, við ES sum heild og við aðrar tjóðir t.d. USA, Ísland og Noreg um útbúgving og gransking.

Fólkatingsessurin er eitt av mongum avboðum í hesi tilgongd. (Nýta fólkatingssessin sum eitt strategiskt amboð í hesi tilgongd fram móti nógv størri altjóða samstarvi)

Fólkatingið er ein av mongum stovnum, ið gevur góðar møguleikar at styrkja okkara støðu í altjóðagerðini.

Vit vilja tí nýta fólkatingssessin sessin sum lopfjøl út í heim. Hann kann vera við til at lata dyr upp úteftir á europeiska meginlandið og víðari ut í heimin.

Hava ein strategi fyri okkara altjóða samstarvi.

Vit skulu eisini hava størri uttanríkispolitiskar heimildir. Vit skulu sjálvsagt hava ávirkan alt altjóða samstarv, sum hevur týdning fyri menning og trivnað í føroyska samfelagnum. Hetta er partur av okkara fólkatingspolitikki so væl sum av okkara sjálvstýris- og sjálvbjargnispolitikki.

Vit skulu hava sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum!

Á fólkatingi vilja vit byggja brýr millum Føroyar og Danmark, millum Føroyar og umheimin. Við áhaldandi kunning, upplýsing, við at skipa netverk og við at skapa økta fatan á øllum stigum fyri okkara viðurskiftum. Brúka tær kontaktflatur sum eitt so stórt og viðurkent ting hevur út í heim.

Vit skulu jú sjalvsagt menna samstarvið Danmark, samstundis sum vit menna sjálvstýrið og sjálvbjargni.

Alt ov nógv politisk orka fer til tugan um fullveldi ella samband. Eingin forðar okkum í at taka ta loysing. Hesum ráða vit sjálv fyri. Men so leingi ein meiriluti ikki ynskir loysing, ræður um at finna eina virðiliga støðu í ríkinum. Hetta hava vit gjørt við at skapa fortreytir fyri eini breiðari tjóðskaparligari semju. Soleiðis vit koma víðari eftir tí hóvligu og stabilu sjálvstýrisleið, sum ein breiður meiriluti av Føroya fólki ynskir.

Latið okkum nýta politiska orkuna til at menna eitt positivt og fruktagott samstarv við Danmark og við allan heimin, samstundis sum vit menna okkara politiska og búskaparliga sjálvstýri.

Eitt samstarv millum javnlíkar samstarvspartar.

Leiðin fram í øllum altjóða høpi er samstarv.

Samstarv gevur úrslit á snøgt sagt øllum økjum.

Velji ein flokk, sum megnar at skapa hetta samstarv - veljið javnaðarflokkin!

# Javnaðarflokkurin er lykilin

**Kristian Magnussen**
*valevni fyri Javnaðarflokkin*



VAL05

Okkara ríkisrættarliga støða setur serlig krøv til flokkar og politikarar, men ásannast má at flestu flokkar ikki megna, á skynsaman hátt at virka í hesum veruleika.

Javnaðarflokkurin er realpolitikkur, eisini í ríkisrættarligum viðurskiftum.

Á Fólkatingi vilja vit, á solidariskum grundvølli, virka fyri sjálvræði og allur politikkur okkara tekur eisini har neyðug fyrilit, bæði fyri tí einstaka og fjøldini.

# Vit slóða fyri

**Kristian Magnussen**
*valevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Javnaðarflokkurin gongur á odda at virka fyri breiðum samstarvi í Føroyum, og vil eisini samstarva við allar flokkar á Fólkatingi fyri at skapa fatan um og innlit í føroysk viðurskifti. Tí er Javnaðarfloksins umboðan á Fólkatingi avgerandi.

# Altjóða solidaritetur

**Kristian Magnussen**
*valevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Føroyar hava tikið størri ábyrgd í altjóða samfelagnum. Javnaðarflokkurin vil eisini styrkja hjálpina til fólk í neyð, har vit við pengum og vinnuligum førleika fara út í heim og eru við til at menna tilafturskomin øki.

# Vit duga samstarv

**Kristian Magnussen**
*valevni Javnaðarfloksins*



VAL05

Hetta valið snýr seg ikki um loysing ella samband. Valið snýr seg um, at bera semjuna, sum endurnýggjar viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, fram á mál. Tað hendir bara, um Javnaðarflokkurin fær umboðan á Fólkatingi.